## Klumman



**Rigmor Dam**
blaðkvinna

## Vælferðar-mafian

Eg havi altíð rindað skatt við gleði. Tí í mun til meginpartin av heiminum eru Føroyar eitt vælferðarparadís, bygt upp av solidariskum og demokratiskum prinsippum. Vit hava gjøgnum mong ár uppbygt eina skipan, har vit rinda nærum helmingin av inntøkuni í skatti, so at vit hava rætt til ymsar ágóðar, tá ið á stendur.

So tá ið fólk spyrja, um tað ikki er súrt at rinda nærum helmingin av allari inntøkuni í skatti, so havi eg altíð svarað nei, tí eg fái so nógv gott fyri hesar pengarnar:

Eg havi rætt til hjálp, tá ið eg verið gomul.

Eg havi rætt til hjálp, tá ið eg verið sjúk.

Eg havi rætt til feriu, tí øll eiga rætt til hvíld.

Eg havi rætt til barsil, um eg verði við barn.

Eg havi rætt til hjálp, um eg verði arbeiðsleys.

Alt hetta var júst endamálið við vælferðarskipanini – sum vit kenna hana her í Norðurlondum. Og tí rindi eg skatt við gleði.

Men, nú kemur tann stóra andsøgnin, sum eisini ger, at tað ikki altíð er so stuttligt at rinda skatt. Tí áðrenn eg veit av, nærkast tey nærum 50 prosentini teimum 60. Hetta er einar tveir minuttir eftir at lønin er komin inn.

Tá verður drigið av til eftirløn, til tá ið eg verði gomul.

Tá verður drigið av til sjúkrakassan, til tá ið eg verði sjúk.

Tá verður drigið av til feriu, tí eg havi rætt til hvíld.

Tá verður drigið av til barsilsgrunn, til teirra, sum verða foreldur.

Og tá verður drigið av til ALS, so at eg kann fáa hjálp, um eg verði arbeiðsleys!!

Og eg, sum helt, at skatturin skuldi tryggja meg, um/tá eg komi í eina støðu, har eg ikki longur eri før fyri at forsyrgja mær sjálvari. Hvar fer allur hesin skatturin? Høvdu teir gomlu vita.

umborð

# Útróðrarmenn tjentu 108.000 í ein mánað

## Umborð



Vilmund Jacobsen
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

**– Árið í fjør var okkara næstbesta, síðan vit keyptu útróðrarbátin Bragd í 1998 – ikki í nøgd, men í veiðivirði, sigur John Kári Jacobsen í Hvannasundi, sum saman við Alexanduri Joensen eigur útróðrarbátin Bragd**

Tá ið viðrar, og streymurin er góður, er nógvur útróður í Klaksvík. Á Stongunum, har tær nógvu línurnar verða egndar, er rættiligt lív í, tá ið mest er at gera. Skúlaungdómur, unglingar og eldri uppilagstir fiskimenn standa í skúrunum og kýta seg, meðan bátarnir fara og koma. Slíkar dagar teljast Stengurnar millum størstu arbeiðspláss í Klaksvík – um ikki tað største.

Ein av bátunum, sum seinastu árini hevur drivið dúgliga á við útróðri, er stálbáturin Bragd, sum John K. Jacobsen og Alexandur Joensen eiga og reka. Teir keyptu bátin úr Porkeri í 1998.

– Tað var Alfred Olsen í Vestmanna, sum í 1978 læt bátin byggja í Noregi. Upprunaliga er Bragd systurskip við Volunteer. Meðan Volunteer er longdur og innilokaður, hevur Bragd fingið kúlustevni, og hálvur annar metur er bygdur upp í hekkuna.

John sigur, at útróðrarbáturin sambært Skipalistanum er 14 metrar langur, men veruliga longdin er 17 metrar – og breiddin 4, 83 metrar.

– Tað er helst gamla mátið, teir hava. Bragd sá eitt sindur "viðtikin" út, tá ið teir keyptu hann, og í byrjanini vóru



*Teir eiga bátin saman, John K. Jacobsen (th.) og Alexandur Joensen. – Árið í fjør vignaðist væl hjá okkum, sigur John, sum Sosialurin hevur skift orð við*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

nýggju eigararnir eisini eitt sindur óhepnir.

– Eftir stuttari tíð brutu vit motorin og noyddust at keypa ein nýggjan. Meðan vit lógu, var lítil og eingin útróður kortini. Í so máta mistu vit ikki nógv.

Motorurin, sum brotnaði, var 260 hk. og tann, sum síðan varð settur í bátin, var 380 hk.

– Vit skiftu ikki gearið, sum vit kortini vistu var til tann minna motorin. Tá gearið fór fyri umleið tveimum árum síðan og bleiv skift, fór aksilin at mala eitt sindur skjótari, og nú fekk báturin eisini meira ferð. Bragd er breiður og er ikki bygdur sum gongubátur, men við vanligari ferð sigla vit millum 8 og 8,5 míl, sum er á góðari leið.

John sigur, at teir fyri umleið 5-6 árum síðan sandblástu og metaliseraðu bátin, sum tað verður rópt, og síðan motorur og seinni gearið eru skift, hevur alt riggað væl.

– Jú, vit eru glaðir fyri Bragd, eingin ivi um tað.

Men hvussu hevur so vignast í vetur?

– Síðsta ár var eitt av teimum góðu hjá okkum – ikki í nøgd, men í veiðivirði var hetta okkara næstbesta ár samanlagt, síðan vit keyptu bátin.

Tað er undantakið, at veiðan fer niður í 100 pund á línuna.

– Vit seta vanliga 60 línur hvørja ferð, og veiðan hevur ligið heilt upp ímóti teimum 14.000 pundunum, sigur hann.

Í heyst og í vetur hava teir havt fleiri setur, sum hava givið meira enn 100.000 krónur í søluvirði.

– Vit høvdu tilsamans 13 setur í november og fiskaðu fyri 1,1 miljón krónur. Hetta gevur ein manningarpart upp á einar 108.000 krónur.

Og fiskaprísurin hevur verið óføra góður.

– So seint sum í næstsíðstu viku seldu vit fyri ein miðalprís upp á 23,52 krónur fyri kilo. Í dag, nú slagið ikki var nakað serligt, og lítið var av gráum fiski, seldu vit fyri miðalprísin 15,79 krónur fyri kilo. Eg plagi at siga, at kunnu vit halda 10 krónur í miðal fyri kilo, so loysir tað seg at rógva út.

Fýra mans eru knýttir at Bragd, tríggir umborð og ein í landi.

– Vit hava eisini verið fýra umborð, men tá veiddu vit gágguna sjálvir. Nú keypa vit agnið frá báti, sum burtur av fiskar gággu. Hetta er dýrari, men lættir ógvuliga nógv um.

At veiða agnið sjálvir, er næstan sum ein útróður aftrat.

– Tá uppiløgur var, fiskaðu vit ofta agn niðurfyri. Aðrar dagar noyddust vit at draga rúsurnar á veg aftur til lands. Hetta kundi til tíðir vera ógvuliga strævið, tá nógvur útróður var.

Í heyst og í vetur hava teir mest egnt høgguslokk og gággu, men tá ið líður út á várið og summarið, egna teir eisini makrel.

Tá nógvur útróður er, svevur John viðhvørt í bátinum, og onkuntíð hevur hann verið í bátinum tað mesta av eini viku.

John letur eisini væl at egnarunum.

– Vit hava góðar egnarnar, óføran skúlaungdóm, tilkomnar og eldri menn, eisini uppilagstir fiskimenn. Jú, tað gongur sera væl at fáa línuna egnda, og tá haldi eg, at eg tosi fyri allar bátarnar, sum egna á Stongunum, sigur John K. Jacobsen.

## Fakta

### Bragd

| | |
|---|---|
| Smíðiár: | 1978 |
| Heimstaður: | Klaksvík |
| Longd: | 17 metrar |
| Breidd: | 4,83 |
| Maskina: | Volvo Penta (380 hk) |
| Eigari: | Sp/f Bragd |
| Útgerðarmaður: | John Kári Jacobsen |

Sosialurin